gult cyan magenta svart



# SvF meira føroyskt

**Tey, sum dáma væl føroyskt tilfar í sjónvarpinum, kunnu gleða seg. Um tvey ár skal helvtin av tilfarinum vera føroyskt, sæst í lógaruppskotinum, sum skal gera Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya til sjálvstøðugar almennar stovnar.**

LOFTMIÐLAR
*Magnus Dam*


*Um tvey ár skal helvtin av øllum tilfarinum í Sjónvarpi Føroya vera føroysk framleiðsla. Hetta málið er ásett í einum uppskoti um broytingar í kringvarpslógini, sum Torbjørn Jacobsen legði fram týsdagin*

Almennu loftmiðlarnir verða nú loystir frá politisku skipanini. Útvarp og Sjónvarp Føroya fara frá at vera sjálvstøðugir stovnar undir landinum til at vera sjálvstøðugir almennir stovnar. Munurin er millum annað, at ein nevnd verður sett inn ímillum landsstýrismannin og stjóran á stovnunum. Tær báðar nevndirnar fáa um hendi ovastu umsitingarligu leiðsluna fyri ávíkavist útvarpið og sjónvarpið. Somuleiðis fáa stovnarnir størri heimildir at skipa egin viðurskifti.

Landsstýrismaðurin fær við nýggju lógini onga heimild at leggja seg útí viðurskifti á almennu loftmiðlunum, tí nevndin fyri stovnarnar hevur endaliga orðið at siga. Nevndin kann kortini ikki blanda seg uppí, hvussu sendingar skulu leggjast til rættis og annað, sum hevur við programmvirksemi at gera. Nevndin setir stjóra, sum hevur endaliga orðið at siga í øllum viðurskiftum, sum hava við sjálvar sendingarnar at gera.

Endamálið við broytingunum er millum annað at forða fyri, at søgan um fíggjarligu trupulleikarnar í sjónvarpinum endurtekur seg. Hóast stovnurin sambært lógini var sjálvsstøðugur, so kom landsstýrismaðurin til sjeynda og síðst at standa við allari ábyrgdini og mátti hjálpa stovninum úr fíggjarligu trupulleikunum.

## Fíggjarliga óheftir

Hóast stovnarnir í dag í meira og minni mun eru fíggjarliga óheftir, so eru kortini nakrar bindingar, sum nýggja lógin loysir. Ætlanin er, at stovnarnir skulu kunna flyta avlop og hall til frá einum ári til árið eftir, og harafturat fáa stovnarnir loyvi til at taka lán í peningastovnunum, um hetta er neyðugt. Hesir spurningar hava verið eitt sindur ógreiðir við verandi lóggávu, men við nýggju lógini verður ásett rættiliga greitt, hvat stovnarnir kunnu og ikki kunnu gera.

## Styrkja um tað føroyska

Hóast endamálið í lógini um at loysa stovnarnar frá polititisku skipanini, so er ikki vist, at løgtingið sleppur undan at játta nakað av peningi. Lógin leggur millum annað upp til, at størri partur av tilfarinum í sjónvarpinum skal gerast í Føroyum. Sum nú er, er málið, at ein triðingur av tilfarinum skal vera føroysk framleiðsla, og hetta málið er um at verða rokkið. Nýggi málsetningurin verður tí, at helvtin av øllum tilfarinum eigur at vera føroysk framleiðsla, tá ið vit koma fram til 1. januar 2003. Eisini skal sjónvarpið leggja størri dent á at teksta sendingar til føroyskt, og málið er, at allar sendingar skulu hava føroyskan tekst í 2003.

Tað fer helst at kosta fitt av peningi at røkka málsetninginum, og líkt er til, at løgtingið noyðist at játta sjónvarpinum eitt sindur av peningi til hetta endamálið. Tilsamans verður talan um tríggjar til fimm milliónir, metir landsstýrismaðurin.

## Viðgera framtíðina

Sjálvt um ÚF og SvF fáa nýggja lóg at virka undir, so er grundarlagið undir almennu loftmiðlunum ikki fullkomið við nýggju lógini. Nógvar broytingar henda á loftmiðlaøkinum, og nýggjar avbjóðingar standa fyri framman. Landsstýrismaðurin ætlar tí í næstum at seta eina fjølmiðlanevnd at viðgera framtíðar lofmiðlapolitikkin í Føroyum.

Nevndin skal taka støðu til nógvar spurningar, sum sníkja seg inn á sjónvarpshyggjaran og alt samfelagið annars. Í viðmerkingunum vísir Torbjørn Jacobsen millum annað á framtíðar leiklutin hjá public service miðlum eins og Sjónvarp Føroya og Útvarp Føroya. Hann vísir á interaktivt sjónvarp, breiðbandaspurningin, digitaliseringina av sendinetinum, og harðskapin, sum verður borin inn í hvørja stovu umvegis fylgisvein. Landsstýrismaðurin spyr millum annað, hvussu alt hetta ávirkar børn og ung, og hvussu vit kunnu nýta nýggju tøkniligu møguleikarar í upplýsingar- og undirvísingarhøpi.

Hetta eru alt spurningar, sum fjølmiðlanevndin skal viðgera komandi mánaðirnar. Sambært Torbirni Jacobsen skulu sakkøn fólk manna nevndina, sum skal leggja eina frágreiðing fram í seinasta lagi um eitt ár.

# Semja um at broyta heimastýrislógina

**Uttanlandsnevndin hjá løgtinginum tekur undir við at broyta heimastýrislógina, so føroyska málið fær eina aðra støðu enn í dag. Tvey uppskot eru komin frá nevndini um, hvussu hetta skal gerast.**

MÁLSTRÍÐIÐ
*Magnus Dam*

Stendur tað til uttanlandsnevndina hjá løgtinginum verður grein 11 í heimastýrislógini annaðhvørt strikað ella orðað øðrvísi enn í dag.

Grein 11 er nógv umrødda greinin um støðuna hjá føroyska málinum. Har stendur, at føroyskt verður viðurkent sum høvuðsmálið í Føroyum, men danskt skal lærast væl og virðiliga. Tað er hendan orðingin, sum danska stjórnin nýtti, tá hon skuldi lýsa støðuna hjá føroyska málinum í samband við evropeiska sáttmálan um økismál og minnilutamál.

Støðan hjá føroyskum varð ikki skrivað inn í sjálvan sáttmálan ella lýst á annan hátt í sáttmálanum. Í staðin gjørdi stjórnin eitt ískoyti til sáttmálan, har sipað verður til grein 11 í heimastýrislógini. Og júst hetta spann í fjør øði í føroyskar politikkarar, sum mótmæltu, at føroyska málið fekk eina tílíka ivasama støðu í samband við ein altjóða sáttmála. Teir vildu ikki hava føroyska málið lýst sum eitt høvuðsmál, men sum tjóðarmálið í Føroyum.

Hendan gongdin fekk í desember í fjør Jóannes Eidesgaard til at leggja fram uppskot um at broyta heimastýrislógina, so tað verður staðfest bæði í heimastýrislógini og síðani í evropiska sáttmálanum um minnilutamál, at føroyskt er tjóðarmálið í Føroyum. Í uppskotinum skjýtur Jóannes Eidesgaard upp, at løgtingið heitir á landsstýrið um at fara til samráðingar við stjórnina um at broyta heimastýrislógina.

Eftir drúgva viðgerð í uttanlandsnevndini er nevndin umsíðir komin til eina niðurstøðu í málinum. Nevndin er samd um, at heimastýrislógin eigur at verða broytt, men broytingin skal ikki gerast, so sum Jóannes Eidesgaard hevur skotið upp.

## Strika greinina

Meirilutin í nevndini, umboðandi allar flokkar uttan Sambandsflokkin, mælir í staðin til, at grein 11 verður strikað úr lógini. Sostatt kemur ikki at standa í lógini, at føroyskt er høvuðsmál og at danskt skal lærast væl og virðiliga. Meirilutin heldur eisini, at áheitanin á landsstýrið um at taka upp samráðingar við stjórnina, skal broytast til eina áheitan um at arbeiða fyri, at heimastýrislógin verður broytt, so grein 11 verður strikað.

Verður uppskotið samtykt, og landsstýrið og stjórnin koma ásamt um at broyta heimastýrislógina samsvarandi, so er sannlíkt, at ískoyti til málsáttmálan um føroyska málið annaðhvørt verður tikið aftur ella broytt, so tað samsvarar við broytingina í heimastýrislógini. Og um einki stendur um føroyska málið í heimastýrislógini, so er heldur einki at siga um føroyska málið í samband við evropeiska málsáttmálan.

Verður grein 11 strikað, so fær hetta ikki stórvegis ávirkan á onnur viðurskifti – eitt nú í samband við rættarmál, vísir skrivarin hjá uttanlandsnevndini á í einum løgfrøðiligum notati.

## Sambandsflokkurin aðra støðu

Hóast Sambandsflokkurin eisini tekur undir við, at grein 11 verður broytt, so hevur hann eina aðra støðu um, hvussu hetta skal gerast. Sambandsflokkurin mælir til, at varðveita orðið høvuðsmál í staðin fyri at brúka orðið tjóðarmál. Sambært minnilutanum skal standa í grein 11 stk. 1, at føroyskt er høvuðsmál í Føroyum. Sambandsflokkurin vil varðveita orðingina í stk. 2, har tað stendur, at við framløgu av appelmálum skal donsk umseting av øllum føroyskum skjølum fylgja við.

Sambandsflokkurin heldur, tað er tryggast og mest einfalt einans at staðfesta, at føroyskt er høvuðsmálið í Føroyum.

– Harvið verður ikki nomið við aðrar umstríddar partar í lógini í hesum umfari, men broytingin loysir tann viðkomandi spurningin, sum uppskotið til samtyktar leggur upp til at greiða, siga Edmund Joensen og Heðin Mortensen í sínum viðmerkingum.

Sama hvør orðing verður samtykt í løgtinginum, so er greitt, at heimastýrislógin verður ikki broytt í bræði. Hetta kann bert gerast eftir samráðingar millum stjórnina og landsstýrið um spurningin, og eingin veit at siga, nær hesar samráðingarnar kunnu fara í gongd. Eingin tiðarfreist er nevnd í uppskotinum.



# Einki felags sjálvstýrisuppskot

**Formaðurin í Javnaðarflokkinum heldur tað ikki vera skilagott at gera eitt felags útspæl við Sambandsflokkinum á ríkisrættarliga økinum. Jóannes Eidesgaard vil ikki útliloka samstarv við hinar flokkarnar kring Sjálvstýrislógina**

SJÁLVSTÝRI
*John Johannessen*





Javnaðarflokkurin ætlar ikki at fylgja tilmælinum frá Samfelagsfrøðinginum, Jógvan Mørkøre, um at gera eitt felags útspæl við Sambandsflokkinum um, hvat skal henda við ríkisrættarligu støðu Føroya.

Tá seinasta veljarakanningin varð almannakunngjørd segði Jógvan Mørkøre, at úrslitið bant Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin til at koma við einum felags útspæli ímóti tí hjá landsstýrinum. Úrslitið var nevniliga eitt greitt nei á fólkaatkvøðuni um fullveldisleistin hjá samgonguni og stór framgongd hjá bæði Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum.

Men kortini heldur Jóannes Eidesgaard tað ikki vera rætt at binda seg til eitt uppskot saman við Sambandsflokkinum og útiloka alt annað.

## Kunnu semjast

Javnaðarflokkurin hevur eitt uppskot til eina Sjálvstýrislóg. Men Jóannes Eidesgaard vísir á, at Sjálvstýrislógin ikki er nakað endaligt uppskot frá Javnaðarflokkinum um, hvat skal henda á ríkisrættarliga økinum. Kortini staðfestir hann, at hon greitt sýnir, hvar Javnaðarflokkurin stendur í málinum.

– Vit í Javnaðarflokkinum vita, at tað eru partar í samgonguni, sum kunnu taka undir við Sjálvstýrislógini. Tí er tað ikki serliga skilagott av okkum at útiloka møguleikanum fyri samstarvi við Sjálvstýrisflokkin og kanska eisini Fólkaflokkin, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hetta samstarv skuldi havt sítt grundstøði í Sjálvstýrislógini hjá Javnaðarflokkinum. Men Jóannes Eidesgaard er sinnaður at laga hana eitt sindur til, so til ber at samstarva.

Formaðurin í Javnaðarflokkinum heldur, at tað hevði verið at frásagt sær nakrar møguleikar, um Javnaðarflokkurin fór í tætt samstarv við Sambandsflokkin beinan vegin.

Kortini vil Jóannes Eidesgaard ikki heilt útiloka eitt samstarv við Sambandsflokkin. Hann heldur, at tað hevði borið til at funnið eitt felags stev við Sambandsflokkin á sjálvstýrisleið, hóast hann er sambandsflokkur. Tí tíðin í dag krevur sjálvstýrispolitikk, staðfestir hann.

## Sjálvstýri við Sambandsflokkinum

Verða andstøðuflokkarnir størstir til eitt komandi løgtingsval, heldur Jóannes Eidesgaard, at tað ber til at fara upp í samgongu saman við Sambandsflokkinum og fáa avrikað nógv á sjálvstýrisleið.

– Sambandsflokkurin hevur staðið fyri afturhaldi, men nú er neyðugt at førka seg longur á sjálvstýrisleið, og tað rokni eg við, at Sambandsflokkurin vil, sigur Jóannes Eidesgaard.

Tá Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin seinast vóru í samgongu saman, hótti Edmund Joensen, sum tá var løgmaður, við at slíta samgonguna, tí Javnaðarflokkurin vildi seta eina nevnd at kanna møguleikarnir fyri yvirtøkum. Men hetta heldur Jóannes Eidesgaard vera eina farna tíð.

Tá samgongan millum Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin slitnaði, segði Jóannes Eidesgaard, at hann fór ikki aftur í samgongu við Sambandsflokkin, so leingi Edmund Joensen var formaður.

Men Jóannes Eidesgaard stendur ikki longur við hesa útsøgn.

– Tá kravdu umstøðurnar, at vit smekkaðu bremsurnar í. Men nú er kemiin fín millum flokkarnar, hóast aktørarnir eru teir somu, sigur Jóannes Eidesgaard.

Formaðurin í Javnaðarflokkinum trýr ikki uppá eina loysn á ríkisrættarliga spurninginum, fyrr enn løgtingsval er útskrivað.

# Blaðmannafelagið mótmælir fyrispurningi



*Justinus Eidesgaard, formaður í Blaðmannafelagnum, hevur heitt á løgtingið um ikki at samtykkja, at fyrispurningur frá Sámal Petur í Grund um redaktionelt val hjá Sjónvarpinum skal svarast*

**Føroya Blaðmannafelag heitir í skrivi á løgtingið um at sýta fyri, at landsstýrismaðurin í mentamálum skal svara einum fyrispurningi um redaktionellu linjuna hjá Sjónvarpinum**

MÓTMÆLI
*John Johannessen*

Løgtingið skuldi í gjár gera av, um ein fyrispurningur frá Sámal Petur í Grund til Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismann í mentamálum, skuldi svarast.

Vanligt er, at løgtingið uttan atkvøðugreiðslu samtykkir, at fyrispurningar skulu svarast. Men í hesum føri hevur Føroya Blaðmannafelag mótmælt, at ein fyrispurningur skal svarast. Blaðmannafelagið metir nevniliga, at fyrispurningurin leggur seg út í redaktionella frælsið hjá fjølmiðlum at nýta tær keldur, redaktiónsleiðslan sjálv metir eru neyðugar at lýsa eitt mál til fulnar.

Í fyrispurninginum vil Sámal Petur í Grund úr Sjálvstýrisflokkinum í fyrsta lagi hava at vita frá landsstýrismanninum, um nakrar reglur eru fyri, nær ein politikari kann koma at skermi og mikrofon í SvF. Í øðrum lagi vil Sámal Petur í Grund hava at vita, um allir politikarar eru líkastillaðir yvir fyri SvF.

Orsøkin til fyrispurngin er, at Jóannes Eidesgaard hóskvøldið í farnu viku slapp framat skýggjan í Sjónvarpinum eftir Grannar Okkara at avsanna tíðindi, sum Hergeir Nielsen hevði borið fram í Degi og Viku fyrr á kvøldi.

# Smyril Line í løgtinginum

**Lagnan hjá Smyril Line liggur nú í hondunum á løgtinginum, sum skal taka støðu til uppskotið hjá Javnaðarflokkinum um at seta 25 milliónir krónur í felagið.**

SMYRIL LINE
*Magnus Dam*

Tað er ein politiskt uppgáva at tryggja, at sambandið við grannarnar er í lagi. Við hesari og øðrum grundgevingum hevur Javnaðarflokkurin skotið upp, at landsstýrið fær heimild til at seta 25 milliónir krónur í Smyril Line.

Eftir at Vinnumálastýrið segði nei, roynir Javnaðarflokkurin nú at sannføra løgtingið um tað rætta í at styðja føroyska felagnum, so felagið megnar at byggja nýggju Norrønu.

Javnaðarflokkurin skjýtur upp, at landsstýrið teknar 25 milliónir krónur í partapeningi, treytað av at onnur tekna 100 milliónir krónur í felagið. Javnaðarflokkurin vísir á, at Smyril Line ikki megnar at lyfta uppgávuna at byggja nýggju Norrønu einsamalt, og flokkurin heldur tað vera rætt, at tað almenna er við í ætlanini, nú tørvur er á hægri partapeningi.

– Vit halda, at tað er ein politiusk uppgáva at tryggja, at sambandið við grannarnar er í lagi, sigur Javnaðarflokkurin og vísir millum annað á, at tað almenna tók stig til at stovna Atlantsflog og legði lunnar undir Skipafelagið Føroyar á sinni.

– Gera vit einki, mugu vit síggja í eyguni, at okkara flutningasskipan fellur burtur, ella í besta føri fer á útlendskar hendur.

Flokkurin vísir á, at grannatjóðirnar hava sæð vandan, og hetlendingar og íslendingar eru sinnaðir at seta 60 milliónir krónur í felagið. Og harafturat gera teir íløgur á landi fyri umleið 100 milliónir.

Landsstýrið eigur sum er 20 prosent av partapeninginum uppá 14 milliónir krónur í Smyril Line, og hetta lutfallið verður varðveitt, um landsstýrið setur 25 milliónir í felagið og onnur tekna partapening fyri 100 milliónir. Framtaksgrunnurin hevur sagt seg vera sinnaðan at seta 25 milliónir í felagið, men hendan tilsøgnin er treytað av, at tveir aðrir stórir íleggjarar eru við.

Javnaðarflokkurin stendur einsamallur sum uppskotsstillari av málinum. Ætlanin var upprunaliga, at Sambandsflokkurin skuldi vera við, men hetta gjørdist av ongum. Uppskotið kom til 1. viðgerð í løgtinginum í gjár, men hetta var aftaná evstamark hjá Sosialinum, so enn ber ikki til at siga, hvørja móttøku tað fær.

Tað er eisini ein almenn uppgáva at tryggja, at Smyril Line megnar at byggja nýggju Norrønu, heldur Javnaðarflokkurin, sum vil hava landsstýrið at seta 25 milliónir krónur í felagið.